## Saxo Bank til Føroya

Danski íløgubankin, Saxo Bank fer 18. og 20. september at skipa fyri íløguskeiðum í Tórshavn og í Klaksvík. Bankin er tann skjótast vaksandi av sínum slagi innan on-line handil yvir alnótina. Saxo Bank hevur í løtuni viðskiftafólk í 115 londum. Hetta er er ein íløgubanki og er tí ikki í kapping við føroyskar bankar um lánivirksemi. Í staðin hevur Saxo Bank tikið stig til samstarv við bankar kring allan heim um tillaging av handilspallum, so at teir kunnu bjóða on-line handils til síni viðskiftafólk.



## Broyttar uppsagnarfreistir

Tryggingarfelagið Føroyar hevur broytt uppsagnarfreistirnar á privatum tyggingum og staðfestir angringarrættin. Frammanundan hava uppsagnarfreistir fyri privatar tryggingar verið ymiskar, men nú kunnu allar brúkaratryggingar sigast upp til mánaðarlok við 30 daga freist, sigur Gunnar í Liða, forstjóri í Tryggingarfelagnum Føroyum.

# Havfisking kann gerast løna

**Í nøkur ár hevur verið tosað um at skipa havfisking sum frítíðarvinnu, og í 2006 fekk táverandi Ferðaráð Føroya, sum nú eitur SamVit, eina hálva miljón krónur játtaða frá Vinnuframagrunninum til eina 2-ára verkætlan. Síðan hevur stovnurin arbeitt við at menna og marknaðarføra »sports fishing« kring Føroyar**

FERÐAVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Verkætlanin, sum botnur varð lagdur undir við teirri hálvu miljónini til menning av frítíðarfiskiskapi í Føroyum, hevur nú hálvt annað ár á baki. Arbeiðið við at menna eitt dygdargott ferðavinnutilboð og fyrireikingarnar at skipa eina málrættaða marknaðarføring á hesum øki, eru komnar væl áleiðis.

SamVit hevur nú skrivað eina frágreiðing um arbeiði, sum higartil er gjørt, og stovnurin hevur eisini gjørt kanningar um frítíðarfiskiskap.

- Seinastu 18 mánaðirnir eru brúktir til nógv kanningararbeiði. Serstaka umhvørvið hjá málbólkinum er kannað, og bygt er eitt netverk við lyklapersónum, lyklamiðlum og øðrum, sum kann verða eini framtíðarmenning og marknaðarføring til gagns, sigur stovnurin.

Skipað hevur verið fyri evnisdøgum, og fundir hava verið, kunningartilfar er framleitt og er í framleiðslu, samband er fingið við serkøn innan havfisking, og ein strategibólkur við umboðum úr vinnuni, Vinnumálaráðnum og Fiskimálaráðnum er settur til at viðgera evnið og gera eina miðvísa æltan fyri framtíðar menning og marknaðarføring av havfisking í Føroyum.

### Á byrjunarstigi

SamVit ásannar í síni frágreiðing, at frítíðarhavfiskiskapur í Føroyum er á byrjunarstigi, men við skilagóðum samstarvi og arbeiði á fleiri økjum, kann havfiskiskapur sum frítíðarvinna gerast ein vinna við stórum figgjarligum møguleikum.

- Høvuðsmarknaðurin telir fleiri enn 50 miljónir fólk, og serliga tríggir bólkar av ferðandi hava føroyskan áhuga.

»Yes! Her býtur á! Nú er at geva tol, berjast við fiskin, draga dýrið inn og síggja, hvussu stórur fongurin er…«

Soleiðis byrjar SamVit ein samandrátt, sum stovnurin hevur gjørt í sambandi við kanningin av havfisking sum frítíðarvinnu í Føroyum.

- Spenningurin við stuttleikafiskiskapi er grundleggjandi menniskjaligur og heimsfevnandi, og áhugin fyri at gera frítíðarhavfiskiskap til eina týðandi vinnugrein í Føroyum er veksandi.

Stovnurin sigur, at fyrstu stigini móti eini veruligari »professionalisering« av frítíðarhavfiskiskapi eru tikin – men enn er langt á mál.

- Vit eru á byrjunarstøði. Í stuttum er neyðugt, at skiparar/báteigarar fáa fleiri royndir og førleikar. Tænastan og vitanin um stuttleikafiskiskap við tøkni, útgerð og annað á sjónum er ikki á nøktandi støði enn, sigur SamVit.

Tað er Birita Nolsøe, ráðgevi hjá SamVit, sum hevur staðið fyri kanningini, og kanningarúrslitið skal nú brúkast til víðari menningini av frítíðarhavfiskiskapi í Føroyum.





*Elin Heinesen, stjóri í SamVit, á ferðavinnustevnuni Vestnorden Travel Mart, sum endaði í gjár*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Ein »nisja«

Stuttleikafiskiskapur er sum heild ein sermarknaður innan ferðavinnu, ein sonevnd »nisja«.

- Kortini vísir okkara kanning, at her er ein stórur marknaður.

SamVit vísir á, at føroyska ferðavinnan hevur avmarknaðar figgjarligar karmar, og tí er neyðugt við ávísum marknaðarfokus, sum tikið verður til.

- Teir marknaðir, sum eru serliga áhugaverdir innan stuttleikafiskiskap, eru Ongland, Danmark, Noreg, Svøríki, Niðurlond, Belgia, Frakland, Týskland, USA, Avstralia og Kanada.

Ferðavinnustovnurin hel-

